

# JÚSTINUS LEIVSSON EIDESGAARD

# 900 DAGAR Í SINGAPORE

Forlagið Hellurnar gevur triðja árið á rað út bók. Hesa ferð eitur bókin *„900 dagar í Singapore"* og fevnir um teir 900 dagarnir, høvundurin **Jústinus Leivsson Eidesgaard** starvaðist í Singapore frá august 1996 og fram til januar 1999.

Hetta tíðarskeið vóru hjúnini Poula og **Jústinus Eidesgaard** savningarstaðurin hjá teimum mongu føroyingunum, sum vitjaðu Singapore, serliga sjómenn, men eisini vanlig ferðandi. Fleiri litmyndir prýða bókina millum annað við skipavitjanum og føroyingum í Singapore.

Bókin er skrivað í tveimum høvuðsløgum og einum triðja, sum av og á kemur til sjóndar. Beinagrindin eru útisetabrøvini, sum høvundurin skrivaði heim til landsmenninar, og sum vóru lisin upp í útvarpinum. Hesi vóru sera væl móttikin heima. Hetta er fyrsta lagið, næsta lagið er søgan um Singapore fram til loysing í 1965. Tað er grundarlagið fyri, at landið, sum er minni enn Føroyar og telur yvir 3 milliónir íbúgvar, er heimsins fjórríkasta land, og hevur lyft seg út triðja heiminum og inn í fyrsta eftir einum ættarliði. Triðja lagið eru eygleiðingarnar, høvundurin gjørdi, nú hann vitjaði aftur í fyrst í hesum árinum.

Bókin vísir eisini føroyingum, at smáar tjóðir kunnu røkka ovastu rók.

Minst til bíleggingarseðilin!



Ovaragøta 1, 188 Hoyvík,
Tel. 322800 ella 223143
justinus@post.olivant.
fo, www.hellurnar.com

**Forlagið Hellurnar**
v/Jústinus Leivsson Eidesgaard



# Stórt sangkvøld í ítróttarhøllini á Eiði



## Kom og syng við sunnukvøldið 10. desember kl. 21.

Sangkvøldið er til frama fyri eina føroyska grønmetis-verkætlan til frama fyri tey fátøku í Rumenia.

Hetta verður eitt serstakt sang- og spælimansupplivings kvøld, har útvið 20 harmonikuspælarar úr so at siga øllum landinum - og úr ymiskum samkomum – luttaka.

**Luttakarar vera:**
- Sangbólkurin Eclesia (við konum)
- Magni Christiansen
- Oasubrøðurnir
- Gullak & Tórhilda
- Hallmar & Hedvig

Atgongumerkini fáast við inngongdina fyri kr. 100,-. Tað stendur tó frítt at geva meira til hesa føroysku verkætlan.

**Vágafólk og Norðoyingar!**
Tað er ókeypis at koyra gjøgnum undirsjóartunlarnar hendan dagin.

Góður andaligur lesnaður og fløgur verða at keypa frá bókaborðinum hjá bókhandlinum Vitin.

Sangløta verður í Miðlon leygardagin 9. desember kl. 12. Eclesia, Oasubrøðurnir og fl. luttaka.

Vælkomin til sangkvøldið í ítróttarhøllini á Eiði 10. desember kl. 21

Vitja inn á www.123hjemmeside.dk/jofri

**Calarasi Missiónin**
V/ Asbjørn Niclasen, Thomas J. Askham, Sverri Kjærbæk


# SUDOKU

Hvønn dag í desember mánaða verða Sudoku uppgávur at finna í Sosialinum.

Jú fleiri uppgávur, ið tú hevur loyst, tess størri møguleika hevur tú at vinna.

Sendið okkum loysnina innan mikudagin 3. januar 2007 kl. 10.00 og viðmerkið brævbjálvan »Sudoku«.

Vinningur í desembur er 2 flogferðaseðlar við FaroeJet. Virði Kr. 4.380,-

Drigið verður fyrstu vikuna í januar.

Fyri at vera við í kappingini, skal øll uppgávan verða loyst.

## DESEMBER-KAPPINGIN

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 8 | | | | | | | |
| | | | 2 | | 4 | | 5 | |
| | | 7 | | 5 | | | | 1 |
| | | 3 | 7 | | | | 8 | 9 |
| | 1 | | | 4 | | | 2 | |
| 9 | 7 | | | | 6 | 4 | | |
| 8 | | | | 3 | | 6 | | |
| | 9 | | 1 | | 7 | | | |
| | | | | | | | 1 | |

faroeJet

**Navn:** ______________________

**Bústaður:** ______________________

**Telefon:** ______________________

Sendið til: Sosialin · Boks 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan »Sudoku«

## Vinningurin í desember

2 flogferðaseðlar við FaroeJet
Virði Kr. 4.380,-



Sosialurin